# List á havinum

**Tvær ungar finskar kvinnur hava tikið stig til eitt heldur forvitnisligt tiltak. Tær fara við ungdómi úr øllum norðurlondum at sigla úr Finnlandi til Íslands og aftur. Á leiðini verður steðgað í Svøríki, Danmark, Føroyum og Noregi. Ætlanin er at hava skiftandi manningar, sum skulu arbeiða við list umborð. Føroyingar hava nú møguleika at melda seg til**



*Taina Mannila fyrireikar í hesum døgum eina ferð við seglbáti millum norðurlondini. Hon verður sjálv við á allari ferðini*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

SIGLING
*Stefan í Skorini*

Í hesum døgum er Taina Mannila úr Finnlandi í Føroyum og roynir at vekja áhuga fyri eini verkætlan, sum hon saman við vinkonu sínari, Mari Järvinen, er farin undir.

Tær báðar ganga á einum listarligum háskúla í Finnlandi, og í hesum sambandi hava tær skipað fyri eini hugvekjandi ferð á havinum.

Ætlanin er at sigla við einum tjúgu metra langum seglbáti runt til øll norðurlondini, tó ikki til Grønland. Byrjað verður í Raahe, sum liggur innast í Botnisku víkini, og síðani verður soleiðis: Raahe-Gotland-Keypmannahavn-Göteborg-Lerwick-Reykjavík-Húsavík í Íslandi-Tórshavn-Bergen-Göteborg-Eckerö-Raahe.

Túrurin verður skipaður soleiðis, at manningin verður skift, har báturin leggur at bryggju. Soleiðis er ætlanin at geva eini 50 ungdómum úr norðurlondum møguleikan at vera við á ferðini.

### Føroyingar vera við

Taina sigur, at hon ætlar at hava eini 5 ella 6 føroyskar ungdómar við á ferðini. Fleiri hava longu sýnt ferðini áhuga, men hon vil fegin hava fleiri at melda seg til.

Luttakarar skulu vera eldri enn 16 ár og kunnu vera upp til eini 25 ára gamlir. Ein onnur treyt er, at teir skulu hava áhuga fyri list, tí ætlanin er, at manningin skal arbeiða við list, meðan siglt verður millum londini.

Taina sigur, at í teimum havnum, har lagt verður inn, fara tey at sýna fram tað, tey hava arbeitt við umborð. Hetta kann vera listaframsýning við myndum, sjónleikur ella onnur list, ið verður sýnd fram.

Tað listarliga arbeiði skal á onkran hátt vísa okkurt frá ferðini. Fyrireikararnir vilja við tí listarliga arbeiðinum vísa samspælið millum havið og menniskju.

Harumframt fara tey at hava eitt upptøkutól við umborð. Upptøkurnar verða lagdar út á heimasíðuna hjá teimum báðum.

Heimasíðan er at finna á www.staf.fi/nordic. Har ber til hjá føroyskum ungdómi at melda seg til sum møguligan áhuga. Fyrireikararnir siga, at tilmelding fer fram í februar mánaða, og síðani verða luttakararnir valdir út í mars.

Lagt verður frá bryggju í Raahe tann 6. juni, og ferðin varðar í tríggjar mánaðir.

# Trý norðurlond í hálvfinulunum

**Bólkaspælið í EM í hondbólti í manshondbólti er av, og heili trý norðurlond hava spælt seg í hálvfinalurnar. Danmark tryggjaði sær plássið við einum sera óvæntaðum sigri á Svøríki, sum tó eisini kom víðari, og Ísland vann á Týsklandi í seinasta dystinum. SvF fer at vísa hálvfinalurnar og finaluna**

HONDBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

EM í hondbólti er í hesum døgum í Svøríki. Kappingin hevur verið sera spennandi, um hugt verður frá einum norðurlendskum sjónarhorni.

Ísland, Danmark og Svøríki hava øll spælt seg í hálvfinalurnar. Danmark og Týskland bresta saman í fyrru hálvfinaluni, og Svøríki og Ísland møtast í hinari.

Danmark tryggjaði sær sess í hálvfinaluni við at vinna 27-26 á Svøríki. Sviar vóru annars á odda 14-11 við steðgin, men danska liðið, sum í minsta lagi skuldi hava javnleik, megnaði at venda dystinum.

Danskir fjølmiðlar eru á gosi um sigurin á svium, og spælararnir verða heiðraðir sum hetjur. Tó skal nevnast, at Svøríki frammanundan hevði tryggjað sær hálvfinalusessin. Tí vórðu nakrir av lyklaspælarunum spardir í pørtum av dystinum.

Danska liðið gjørdist vinnari av bólkinum við níggju stigum, og Svøríki var nummar tvey við átta stigum. Russar kom ikki víðari. Teir endaðu á triðja plássi við sjey stigum.

Ísland skuldi somuleiðis hava stig í seinasta dystinum móti Týsklandi, sum eisini hevði tryggjað sær víðari luttøku. Ísland vann dystin 29-24 og fer harvið víðari í hálvfinaluna sum vinnari av bólkinum. Týskland endaði á øðrum plássi, meðan Frakland óvæntað ikki megnaði at spæla seg víðari.

Sostatt hava trý norðurlond spælt seg í hálvfinalurnar. At vertirnir Svøríki komu víðari var ikki óvæntað, men at Danmark og Ísland eisini megnaðu at koma víðari, hevur tikið fleiri á bóli.

### SvF vísir dystirnar

Sjónvarp Føroya fer at vísa báðar hálvfinalurnar og finaluna. Hálvfinalurnar, sum verða spældar leygardagin, verða ikki sendar beinleiðis, men tær verða bandaðar og sendar seinni. Orsøkin til hetta er, at finalurnar í føroysku steypakappingunum hjá monnum og kvinnum verða sendar beinleiðis úr høllini á Hálsi seinnapartin leygardagin.

Fyrra hálvfinalan í EM verður víst klokkan 23.25 leygarkvøldið, og seinna hálvfinalan verður víst dagin eftir, sunnudagin klokkan 12.30. Finalan verður send beinleiðis úr Svøríki klokkan 16.40 føroyska tíð.

Finalan í føroysku steypakappingini hjá kvinnum verður á skíggjanum klokkan 15, og finalan hjá monnum verður send klokkan 17.



*Svøríki tapti hósdagin óvæntað móti Danmark, men kom tó víðari til hálvfinaluna. EM-finalan verður víst beinleiðis í SvF sunnudagin*

*Mynd: Reuters*

## 14 íslendingar í Listaskálanum

LISTAFRAMSÝNING
*Stefan í Skorini*

Í dag, leygardagin, letur ársins fyrsta listaframsýning upp í Listaskálanum í Havn. Latið verður upp klokkan 16.00. Hetta er ein sera fjølbroytt listaframsýning við 14 ymiskum listafólkum av Akureyri.

Borgarstjórin á Akureyri, Kristján Þór Júlíusson, setir framsýningina og bjóðar øllum vælkomnum at skoða listaverkini hjá listafólkunum av Akureyri.

Tey fjúrtan listafólkini reka saman gallaríið Samlagið í tí tiltikna listaumhvørvinum "Listagilinum" á Akureyri.

Við á framsýningini verða Anna María Guðmann (akrýlmálningar), Anna Sigríður Hróðmarsdóttir (leirlist, steintoy og postalín), Anne Kampp (Leirlist), Einar Helgason (vatnlitamálningar), Guðmundur Ármann Sigurjónsson (oljumálningar), Hadda (akrýl og damask), Halldóra Helgadóttir (oljumálningar), Hrefna Harðardóttir (steintoy), Jonna (akrýlmálningar), Ragnheiður Tórsdóttir (vovnar myndir), Rósa Kristín Júlíusdóttir (pappírsteppi), Sigríður Ágústsdóttir (keramikkur og leirlist), Sigurveig Sigurðardóttir (akrýl- og oljumálningar) og Sveinbjørg Hallgrímsdóttir (grafikkur).




Stórur brúktbilamarknaður

Mazda 323 S 1,5i LX
Gráur, 4 hurðar, 5 gear, Km. 27.000, árg. 10/97
85.000,-

Mazda 323 S 1,5i LX
Reyður, 4 hurðar, 5 gear, Km.68.000, árg. 05/97
Sleipikrók
90.000,-

Mazda 323 S 2,0 Diesel LX
Gráur, 4 hurðar, 5 gear, Km.84.000, árg. 06/98
125.000,-

Mazda 626 HB 2,0i GLX
Grønur, 5 hurðar, 5 gear, Km.149.000, árg. 01/99
159.000,-

Mazda 929 S 2,2i GLX
Sýnaður 05/01
Bláur, 4 hurðar, 5 gear, Km.145.000, árg. 03/89
Sóltak
45.000,-

Fiat Multipla 1,6
Gráur, 5 hurðar, 5 gear, árg. 01/00
156.000,-

Ford Escort 1,8 Diesel Sedan
Sýnaður 02/00
Bláur, 4 hurðar, 5 gear, Km.126.000, árg. 09/95
66.000,-

Ford Escort 1,8TD St.Car
Sýnaður 02/00
reyður, 5 hurðar, 5 gear, Km.44.000, árg. 08/97
130.000,-

Ford Mondeo
reyður, 4 hurðar, 5 gear
Km. 80.000, árg 01/95






65.000,-

Ford Escort St.car 1,6 Zetec
Grønur, 5 hurðar, 5 gear, Km.33.000, árg. 06/98
124.000,-

Honda Civic S 1,4 IS
Sýnaður 02/00
Hvítur, 4 hurðar, 5 gear, Km.76.000, árg. 12/98
112.000,-

SAAB 900
Sýnaður 04/01
Hvítur, 4 hurðar, 5 gear, Km.171.000, árg. 10/88
5.000,-

Renault Megane 1,4e
Grønur, 5 hurðar, 5 gear, Km.34.000, árg. 08/98
110.000,-

Renault Megane 1,4e
Grønur, 5 hurðar, 5 gear, Km.58.000, árg. 04/97
120.000,-

Renault Megane 1,6e
Sýnaður 09/00
Reyður, 5 hurðar, 5 gear, Km.60.000, árg. 12/96
100.000,-

Renault Megane 1,6e Sedan
Beige, 4 hurðar, 5 gear, Km.35.000, árg. 06/98
Sleipikrók
120.000,-

BERG MOTORS
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35


# Døgurðatímin – eitt »heitt epli«

**Ætlandi fara tey 60 fólkini, sum starvast hjá fyrrverandi Nyki á Toftum, at arkvøða um eitt uppskot, sum leiðslan á virkinum saman við álitisfólkunum hevur gjørt.**



*- Okkum kann tað sum so gera tað sama, um vit hava døgurðatíma ella matarsteðg, men tey eru fleiri, sum vildu havt frí ein tíma fyrr um dagin, sigur virkisleiðarin á Fiskavirking á Toftum, Birgir Nónsgjógv. Men semja er ikki um døgurðatíman*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tað er ikki altíð so lætt at broyta gamlar vanar, óvanar ella traditiónir, vildi onkur sagt.

Sosialurin fylgdi gongdini, tá ið ein stórur meiriluti av arbeiðsfólkinum á Kósini í Klaksvík vildi hava døgurðatíman avtiknan til fyrimuns fyri ein matarsteðg millum kl. 12 og 13, soleiðis at arbeiðsfólkið slapp ein tíma fyrr til hús.

Tað tók sína tíð at seta hesa broyting í verk, men 1. januar vórðu ynskini hjá meirilutanum framd í verki.

### Eitt "heitt epli"

Á Fiskavirking á Toftum hevur nú sama mál tikið seg upp sum á Kósini og aðrastaðni, har gamla traditiónin við døgurðatíma er brotin.

Eisini her eru ymiskar meiningar um, hvussu fram skal farast. Fleiri eru fyri at avtaka døgurðatíman til fyrimuns fyri ein matarsteðg; onnur vilja varðveita døgurðatíman, soleiðis sum hann er.

Meiningarnar fyri og ímóti eru ymiskar, og tað veldst eisini um nógv ymisk viðurskifti, sum tala fyri ella ímóti.

Birgir Nónsgjógv, virkisleiðari, sigur, at teir hava 40 minuttir at "disponera" yvir.

- Tí hava vit í samráð við álitisfólkini skotið upp at hava ein matarsteðg uppá 20 minuttir millum kl. 12 og 13, ein kaffisteðg fyrrapart og ein seinnapart uppá 15 minuttir hvør. Men fyri at "kompensera" teir 10 minuttirnar, sum her fara útyvir teir 40, vit hava at ráða yvir, hava vit skotið upp at arbeiða til kl. 16.10.

### Prinsippmál

Virkisleiðarin sigur, at teir hava tosað við arbeiðsmannafelagið um hesi viðurskifti, men líkt er ikki til, at felagið er sinnað at ganga við til at loysa málið á henda hátt, tí sum skilst, er hetta eitt prinsippmál.

- So, hetta málið verður møguliga ikki so lætt at loysa, sum tað kanska átti at verið, sigur Birgir.

Hetta heldur hann vera spell, tí eftir hvat hann hevur skilt, eru arbeiðsfólkini yvirhøvur fegin um hetta uppskotið.

– Okkum kann tað sum so gera tað sama, um vit hava døgurðatíma ella matarsteðg, men tey eru fleiri, sum vildu havt frí ein tíma fyrr um dagin, sigur virkisleiðarin at enda.

Sosialurin fer at venda aftur til málið í komandi viku.

# Gomul býarmynd hvørvur

**Fríggjadagin varð kassin slóktur og dyrnar latnar aftur fyri seinastu ferð í kioskini hjá Meinhardi Joensen á Nólsoyar Páls gøtu í Klaksvík.**



*Ein av trúgvu og seinastu kundunum í kioskini hjá Meinhardi støkkur inn á gólvið. Gunnhild Dahl Niclassen er ein av mongu ungu kvinnunum, sum hava givið norðingum eina góða tænastu í mong ár.*

*Mynd: Jan*

KIOSK
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Í góð 26 ár hevur hugnaliga kioskin hjá Meinhardi verið ein partur av býarmyndini í Klaksvík, og serliga um summarið hava klaksvíkingar notið gott av tí stóra úrvalinum av ísum, sum kioskin hevur selt. Ikki hevur verið óvanligt at sæð stóra mongd av fólki sitandi uttanfyri kioskina við hvør sínum svalandi ísi, meðan sólin stóð hægst á himli.

Tað eru dóttir og versonur Meinhard Joensen, ið hava rikið kioskina tey seinastu árini, men nú hildu tey so, at tíðin var komin til at lata kioskina aftur.

### Summardáin flytir inn ístaðin

Hetta merkir tó ikki, at bygningurin kemur at standa tómur.

Blómuhandilin Summardáin við Karinu Joensen, sum higartil hevur ligið á Gerðagøtu, fer nú at halda til í hølunum, har kioskin fyrr var.

Hetta tí at hølið hjá Summardáini nú skal nýtast til skrivstovuvirksemi og annað hjá P/f Tummas Thomsen.

Frá Summardáini frætta vit, at tey væntandi kunnu lata dyrnar upp í teim nýggju hølunum um miðjan februar. Tey halda hetta verða eitt spennandi høvi til at betra um virksemi teirra, og gleða seg til at sleppa í gongd í teim nýggju hølunum.

### Gamal skógvahandil

Hetta við at handlar húsast í bygninginum á Nólsoyar Páls gøtu er tó ikki nøkur nýggj søga.

Í eitt mannaminni hevði Meinhard Joensen, sáli, skógvahandil í hølunum, og minnast serliga teir eldru norðingarnir væl skógvarnir frá Meinhardi.

Í 1976 skifti hann tó skógvavirkesemi út við eina søtari vinnu, og fara allir norðingar serliga at minnast ísarnir, ið hava gjørt mangan heitan summardagin svalligari.

Hetta er tó søga nú, og mugu klaksvíkingar finna sær eitt nýtt stað at keypa ísar frá komandi summar.



*Søtt, søtari, søtast. Nógv góðgæti er keypt í kioskini hjá Meinhardi millum ár og dag.*

*Mynd: Jan*